Skipaður kriminalitetur:

# Stjala íbúðirnar frá

Í Russlandi eru umleið 700.000 heimleysir ungdómar. Hetta er eitt syndarligt tal, sum alsamt veksur. Lívið hjá teimum einstøku heimleysu, er ymiskt. Nøkur hava ongastaðni at verða, meðan onnur eiga eitt pláss á onkrum barnaheimi



*Útsýni yvir Moskvaánna sum rennur gjøgnum miðbýin í Moskva*

FRÁSØGN
*Jógvan Skýlindal*

Seinastu tvey árini hevur hjálp verið veitt úr Føroyum, til 720 av hesum ungdómunum. Hesir ungdómarnir búgva á fimm ymiskum barnaheimum. Hjálpin verður samskipað gjøgnum føroyska felagskapin "Umsorgan".

Tað er ikki nøkur løtt uppgáva at náa fram til tey heimleysu í Russlandi. Eitt er at finna fram til tey heimleysu sum halda til niðri við høvuðstokstøðina í Moskva. Men hvussu koma vit inn á tey statsriknu heimini? Og hvussu sleppa vit at hjálpa børnunum og siga teimum frá Jesusi og greiða teimum frá frelsuni?

Tað letur seg ikki gera, uttan við góðari hjálp frá russiskum privatpersónum, starvsfólki og leiðslu á teimum ymisku heimunum og frá leiðslunum innanfyri tey sosialu økini.

### Hvat gera vit?

Fyrst og fremst veita vit figgjarligan stuðul. Stuðulin verður brúktur til klæðir, skógvar, vitaminir, tannkrem, skúlating og mangt annað, sum heimini ongantíð eiga nóg mikið av.

Nógvir bíbliutímar verða hildnir saman við børnunum, har tey hoyra evangeliið um Jesus og læra at taka andaligar avgerðir hvønn dag. Vit biðja saman við børnunum og svara teirra spurningum.

Av tí at vit eru vorðin ein partur av skipanini fyri heimleys á nøkrum av barnaheimunum, síggja vit mangan hvussu nógv børn fara ígjøgnum svárar sorgarleikir og royndir í teirra unga lívi. Vit bjóða bíbilska vegleiðing til teirra sum hava verið gjøgnum ræðuligar royndir og bera sálarlig og likamlig sár eftir upplivingar tey hava verið ígjøgnum

Útferðir verða gjørdar út í skógin saman við teimum. Endamálið er at hava tað stuttligt saman. Har verður grillað og spælt og sungið. Hesar útferðirnar eru av alstórum týdningi, tí lívið hjá teimum er annars grátt og keðiligt. Men hesar útferðirnar lýsa upp í teirra dagligdegi.

Vit læra tey ymiskt um gerandisdagin. Fleiri vita ikki hvussu ein døgurði verður tilgjørdur. Fleiri hava ongantíð verið hjá frisør. Alt hetta gera vit saman við teimum í vónini um, at tað fer at hjálpa teimum at duga betur at laga seg eftir tí veruliga lívinum, tá tey skulu úr heimunum og standa á egnum beinum.

### Tey eldru børnini

Vit bjóða teimum eldru børnunum – sum ikki longur búgva á barnaheimunum – at vera við til øll tiltøkini vit skipa fyri, sum til dømis nýggjársveitslur, grilla og sovorðið. Vit royna at fáa tey at vera við í umvælingararbeiðunum, at læra tey at tæna øðrum og ikki bara lata onnur tæna sær. Vit kenna hesi børnini og royna at hjálpa teimum at gerast vaksin og læra tey at hjálpa øðrum.

Beint nú hava vit sett fimm fyrrverandi barnaheimsbørn í ymisk umvælingararbeiðir. Soleiðis læra tey at arbeiða, og tað sum er mest umráðandi: Tey læra teir grundleggjandi arbeiðsvanarnar, sum til dømis, ábyrgd og áhaldni – og verða í allar mátar meiri stinn.

Í 2005 eydnaðist okkum at gera fimm rúm í tí eina barnaheiminum, til børn við ymiskum likamligum ella sálarligum tørvi. Hesi rúmini verða bara brúkt av okkum. Eingin annar hevur atgongd til hesi rúmini, heldur ikki leiðslurnar á barnaheimunum. Soleiðis ljóðar tann avtalan.

Eg eri ikki í iva um at hetta er tann mest tørvandi parturin í tí Russiska samfelagnum, samstundis sum hetta eisini er tann mest vanrøktaði parturin, saman við fangunum sum sita í fangahúsi. Hetta er við øðrum orðum, ein lívsneyðug tænasta hjá okkum trúgvandi at gera, ella vera við til at stuðla.

Sambært myndugleikunum útvega teir hvørjum einstøkum barni sín egna verja, men hetta er bara tóm løgfrøði, í veruleikanum eru tey púra einsamøll.

Nøkur koma hvønn sunnudag á møti í okkara lítlu samkomu, sum vit byrjaðu síðsta summar. Møtini verða hildin í leigaðum hølum norðanfyri Moskva. Har fáa tey bæði andaliga og tímiliga hjálp. Tey fáa klæðir, mat og annað.

Nøkur fáa eitt lítið krónutal at keypa sær mat fyri gjøgnum vikuna og hesi verða eisini ráðførd í sambandi við arbeiði og í teimum vanligu lívsviðurskiftunum. Tey eiga einki, tá tey fara út í lívið og mangla sostatt alt. Í flestum førum hava tey eitt kamar, sum staturin útvegar teimum, ella onkra lítla íbúð, sum foreldrini hava latið eftir seg, men hesi støðini eru mangan í so ringum standi, at eingin møguleiki er at lívbjarga sær har – ongar hurðar, brotin vindeygu, eingin streymur. So hasar íbúðirnar eru sum so bara til á pappírinum, men ikki til nakra hjálp. Har hjálpa vit børnunum við umvælingum og øðrum.



*"Borðið" er baklúkan á einum Lada Sputnik*

### Skipaði kriminaliteturin

Mangan síggja vit hvussu tann skipaði kriminaliteturin roynir at stjala íbúðirnar frá teimum foreldraleysu børnunum. Tí, lógliga hava tey fulla ábyrgd av sínum handlingum, og av tí at fleiri av teimum ikki kenna tað veruliga virðið ein íbúð stendur í, kunnu tey finna uppá at selja íbúðina fyri ein prís, sum bara er ein brotpartur av veruliga virðinum. Tey kriminellu eru væl vitandi um hetta her, so tey royna at fylgja teimum foreldraleysu upp, tá tey flyta úr heimunum. Ymiskir mátar verða brúktir – vanligast er tó alkohol og konufólk – tey skeinkja børnini full og fáa tey tey síðani at skriva undir keypssáttmálarnar. Lógarskipanin hevur ongan myndugleika her. Sosialráðgevararnir tora einki at gera. Politiið og dómsvaldið eru bangin og halda seg langt burtur. Vit eru eisini bangin, men vit noyðast at grýpa inn, og tað gera vit eisini. Seinast vit vóru har yviri eydnaðist okkum at taka tríggjar íbúðir, sum annars høvdu fallið í skeivar hendur.

Okkara arbeiði á hesum umráðnum er at ávara tey um vandan og verja tey. Hvørt einstakt barn fær sína persónligu vegleiðing, eftir hvussu tað er fyri sálarliga og likamliga.

Lívið hjá teimum, aftaná at tey eru flutt út úr barnaheimunum er ein stórur hurlivasi. Og tað er okkara uppgáva at gera nakað á tí økinum

Vituliga eru vit langt frá